# Kóvboysøgur úr korridorunum

TÓRBJØRN JACOBSEN



Beint sum tað fættist, at fyrrverandi lemmatrolarar vóru farnir at partrola á upsaleiðunum, har skip í bólki 2 vanliga veiða, róðu korridorkóvboyarar á tingi framundir, at upphavið til hetta skiftið ímillum bólk 1 og 2, skuldi vera eitt royndarloyvi, sum undirritaði hevði latið tveimum djúpvatnstrolarum í 2008. Óneyðugt er at siga, hvør flokkurin er, sum plantaði mýtuna, og nú síggi eg, at sjálvt ein skilamaður, sum Hans í Líðini, er farin at endurgeva hesa uppspunnu søguna. Giti, at hann ikki veit betur, orsakað av vantandi skjalprógvi. Og ivaleyst hevur onkur politistur ella skúlalærari í Fólkaflokkinum sagt honum hetta, fyri at fáa treystari kjølfestu í mýtuna. Hansara politiski observansur kann eisini tæna endamálinum. Tað riggar líkasum betri, táið ein skipari úttalar seg um tað, sum fyriferst í tí váta elementinum. Móttakarin hevði verið eitt sindur ivasamari, tað hevði verið sum at sletta vatn á gás, um Jógvan á Lakjuni, Bjarni Djurholm, Jákup Mikkelsen, Annika Olsen, Óli Breckmann ella Jacob Vestergaard løgdu til brots í royndini at manipulera veruleikan úr spónalagnum.

Havi sett landsstýrismanninum í fiskivinnumálum nakrar spurningar um hetta málið, tað er mín fólkaræðisligi rættur, og tað eigur ikki at koma óvart á nakran, táið eg eri framsøgumaður Tjóðveldisins í fiskivinnumálum. Annars ætli eg mær ikki at leggja uppí stríðið ímillum Georg L. Petersen og Hans í Líðini. Tó er ein setningur í greinini hjá Hansi, sum rópar eftir eini viðmerking. Hesin er soljóðandi:

*"Fyri tveimum árum síðani fekk trolarin "Edna" úr Tórshavn eitt tilmæli um at sleppa at partrola á ytri leið, hetta var um tað tíðina, tá Torbjørn Jacobsen sat sum fiskimálaráðharri og tí skilir ongin, at hann nú setur spurningar um hetta sama royndarveiðuloyvi?"*

Ikki Hansi at siga, so var djúpvatnsflotin longu fyri tveimum árum síðani komin í kreppu. Menn royndu av øllum alvi at koma sær úr ringu støðuni, og ein ætlað roynd var, at partrola á somu leiðum, sum roynt hevði verið við lemmum frammanundan. Ikki tí at man ætlaði sær inn í upsafiskiskapin, har partrolararnir vanliga veiddu og fingu sína útkomu. Ætlanin var heldur, at gera eina roynd fyri at finna fram til, um betri búskapur kundi fáast burtur úr at partrola eftir traditionellu fiskasløgunum hjá lemmatrolarunum.

Til hesa roynd varð royndarloyvi til partroling í føroyskum sjógvi í 2008 latið mtr. "Edna" og mtr. "Rankin" samsvarandi § 20, stk. 2, í løgtingslóg no. 28 frá 10. mars 1994 um vinnuligan fiskiskap. Loyvið er dagsett 5. juni 2008, og loyvið var bara galdandi fyri tað, ið eftir var av árinum. Tvs., at tað var ikki til eftir 31. desember 2008. Loyvið var ongantíð brúkt, og tað kann vera, at strongu treytirnar vóru orsøkin til tað. Hesar vóru annars:

- at roynt verður bert á leiðum uttanfyri linjur drignar millum knattstøður sambært hjálagda fylgiskjali. (Um onkur skuldi havt tørv á at vita meira um tær tríati ásettu knattstøðurnar, kann viðkomandi venda sær til greinskrivaran, - tj.)
- at galdandi reglur um fiskiskap við troli í føroyskum sjógvi verða fylgdar.
- at skiparin boðar Fiskiveiðieftirlitinum frá, tá túrur byrjar og tá túrur endar.
- at royndirnar fara fram í samstarvi við og eftir treytum ásettum av Fiskirannsóknar-stovuni.
- at nágreinilig ætlan skal gerast fyri royndirnar við upplýsingum um m.a. reiðskap, leiðir og tíðarskeið, sum skal góðkennast av Fiskirannsóknarstovuni.
- at gjøllig dagbók verður førd yvir royndirnar eftir leiðbeining frá Fiskirannsóknar-stovuni og avrit av dagbókini skal latast Fiskirannsóknarstovuni, tá royndirnar eru lidnar ella tá biðið verður um tað.
- at fólk frá Fiskirannsóknarstovuni kann vera við skipinum.
- at oljunýtslan hjá skipinum verður skrásett á ein hátt, so hon kann samanberast við troling við lemmum.
- at royndarfiskiskapurin verður lagdur so til rættis, at hann ikki er øðrum fiskiskapi til ampa og skal, um neyðugt, víkja fyri øðrum fiskiskapi.

Til endans varð greitt tilskilað, at royndarloyvið kundi verða inndrigið uttan ávaring í loyvistíðarskeiðnum (05.06.08-31.12.08), um skiparin ikki ansaði eftir, at treytirnar vórðu fylgdar.

Vónandi er hendan frágreiðingin ein ivaleysa greið váttan fyri, at royndarloyvið í 2008 og nýíkomna støðan í upsaveiðuni, har partrolarar (bólkur 2) og lemmatrolarar (bólkur 1) partrola hvør um annan við sama reiðskapi, ikki eru tvær alin av sama vaðmali.

Umsøknin um royndarloyvið í 2008 prógvar, at politiska skipanin, fyrisitingin og ikki minst vinnan høvdu somu áskoðan viðvíkjandi hesum, hvussu lógin um vinnuligan fiskiskap skuldi skiljast, tulkast og praktiserast, táið tað snúði seg um at partrola við "lemmatrolarum" á innaru leiðunum – á upsaleið um man vil. Royndarloyvið í slakar sjey mánaðir í 2008 skuldi bert geva eina ábending um eina møguliga búskaparliga rajonalisering, umvegis partroling eftir fiskasløgunum, sum djúpvatnstrolararnir frammanundan høvdu havt sum høvuðsveiði. Úrslit kom onki burturúr, tí royndin varð ongantíð gjørd. Men logikkurin er ikki til at fara skeivur av, vinnan søkti um loyvið, tí hon var sannførd um, at lógin ikki loyvdi tí. Fyrisitingin var av somu áskoðan. Nú tykist hesin logikkur, og samlaða niðurstøðan hjá øllum, sum varða av føroyskari fiskiveiði, at hava fingið eitt rættiligt skot fyri bógvin. Juridiski reykurin er snaraður 180 stig. Fyri at vita hví so er, eru spurningarnir til landsstýrismannin settir.

Svarið verður helst ein slutur fyri ein slatur, tí fiskivinnupolitikkur er ongin í landinum - hann er ikki til. Uppsjóvarflotin kundi ikki fara á svartkjaftaveiði fyrrenn næstan tveir mánaðir vóru farnir av árinum, tí landsstýrismaðurin bíðaði eftir hvønn politikk felagið Nótaskip ætlaði at seta sum karm um sína egnu vinnu, og nú situr felagið Trolskip og roynir at toyggja seg til ein politikk, um hvussu teir báðir fremstu bólkarnir í flotanum skulu skipast í fiskiveiðini. Verður hetta lagið, er ongin orsøk til at manna politisku sessirnar longur. Vinnan finnur onkursvegna útav tí, og har eru nógvir trivaligir skilamenn, væl kálvføddir og uppvaksnir undir truplum umstøðum í Norðurhøvum, trupulleikin er bara, at teir eru so mangir í mun til stórar avmarkingar, tí er ein neyv politisk stýring neyðug, skal optimala úrslitið røkkast hjá manningum, reiðarum og samfelag. Fólkið velur politikararnar og fólkið eigur tilfeingið, tí ógvast mong um ignorantin, sum nú slítur krakkabetrekkini á Heykavegnum í Havn.

Í hesum politiska ruðuleikanum stríðist felagið Trolskip, sambært Dimmalætting, fyri at fáa MSC-góðkenning um burðardygga veiði í upsafiskiskapinum. Vónandi vignast tað, men núverandi regime í danska heimastýrinum ger teimum ikki lívið lættari. Ætlar tú at vera papageykur hjá øllum, vinur við alt og øll, átøkur hesum dukkunum kúputar í neðra, og sum altíð toyggja seg líka langt, sum tær verða trýstar, uttan at falla, so er ráðharrasætið í fiskivinnumálum ein rangstaddur sessur.




# Eftir orrustuna

HANS J. HERMANSEN



FSF-aðalfundurin er av. Vígvøllurin líkist vígvøllum flestum. Bardagin hevur verið harður, og stríðsmenn dreiva aftur og fram, sjónliga merktir av bardaganum, bæði likamliga og sálarliga.

Ilt er at vita, hvør hevur sigrað, og hvør má rýma fyri at sleikja sárini – til næstu glíming um eitt ella tvey ár.

**Hægsti myndugleiki?**
FSF, Fótbóltssamband Føroya, er sett saman av fótbóltsfeløgum kring landið. Greiðar reglur eru fyri, hvør sleppur at atkvøða, hvussu nógvar atkvøður hvørt felagið hevur, hvussu nógv fólk kunnu koma frá hvørjum felag osfr. Alt hetta sæst á heimasíðu FSF's. Aðalfundurin er hægsti myndugleiki felagsskapsins. Úr reglugerð FSF's: *"Fyri hvørt felag kunna 3 persónar luttaka. Hesir skulu hava skrivliga fulltrú frá sínum felag, sum gevur teimum heimild at møta og at atkvøða á aðalfundinum. Limafeløg hava eina atkvøðu í part."*

**Val ella kvett?**
Hóast reglur og mannagongdir eru fyri, hvussu valið og aðalfundurin skulu fara fram, gerast menn so heitir av valdsrúsinum, at tær verða skúgvaðar til viks eina løtu – ella kanska langt fyri aðalfundin. Longu seinasta heyst fættist, at formenn vóru gingnir saman fyri at fáa ætlaða úrslitið. Annað valevnið sigst hava sett sum treyt, at hann stillaði bara upp, um hann var vísur í, at hann fór at vinna! Sádan! Og tað ber til í einum fríum og demokratiskum vali?! Eins og í ást og orrustu er eftir øllum at døma alt loyvt, tá ið ræður um at fáa sín vilja. Er neyðugt við aðalfundi? Er hetta eitt frítt val, ella er hetta eitt kvett?

**Reglur felaganna**
Hvørt felag hevur somuleiðis sínar greiðu reglur at fylgja. Havi ikki hugt at reglunum fyri øll fótbóltsfeløgini í Føroyum, men flestu teirra hava reglur, ið greitt siga, hvussu farast skal fram: Aðalfundurin er hægsti myndugleiki, og nevndin kann tekna felagið eftir ávísari mannagongd: formaður saman við kassmeistara kann umboða felagið, formaður saman við 2 nevndarlimum kann tekna felagið osfr. Greiðar, einfaldar og vælskipaðar reglur. Men verða tær fylgdar?

**Heimildarmisnýtsla?**
Hava øll felagsumboð fingið neyðugar heimildir til at greiða atkvøðu sambært aðalfundarsamtykt egna fótbóltsfelags? Hava felagslimir fingið høvi til at viðgera aðalfund FSF's? Eru umboð farin á FSF-aðalfund uttan at hava boðað egnum felagi frá ætlanum sínum? Spurningur mín er tí: Er aðalfundur FSF's farin reiðiliga fram? Um upplýsingar, ið hava týðning fyri aðalfund FSF's, verða fjaldar á felaganna aðalfundi, stutt fyri aðalfund Fótbóltssambandsins, má tað tykjast løgið, sera óheppið, og tað beinir tankarnar inn á fjalda dagsskrá. Hvussu nevnist tílíkt? Og er tað samsvarandi verandi reglugerðum? Spyrji bara.

**Hví?**
Nú kann hetta tykjast heldur grenjut, kann onkur halda, men kortini er umráðandi, at gjørdar reglur og mannagongdir verða fylgdar. Hesar reglur og mannagongdir eru ikki tilvildarligar og óneyðugar. Hesar reglur eru vorðnar til av drúgvum royndum, og menn hava skilt, hvussu neyðugar tær eru. Hetta er fyri at verja ein idéalistiskan og vælskipaðan felagsskap, soleiðis at hann skal virka sambært ungdómsins fyrimyndum og virðum.

Hesar eru orsøkirnar til, at eg havi staðið fram fyri at gera vart við viðurskifti, ið eg haldi, at bæði fótbóltsfeløg og FSF hava svikið. Tá vita vit, at vandin fyri líkasælu er nær. Hetta er okkara fólkaræðisligi rættur – og ikki minst skylda! Aðalfundurin er hægsti myndugleiki – og tað eigur hann altíð at vera! Tann, ið svevur, kann aldri kenna seg tryggan. Tí er umráðandi at vera árvakin – altíð og eisini í smáum!

Við ítróttarkvøðu, og við ynskinum um góðan byr fyri FSF – føroyskum ungdómi at frama.

**E.S.:** Spurningar mínir til B 36 fyri tveimum vikum síðan, eru framvegis ikki svaraðir: Hví?